## City vil hava Eto'o

Joan Laporta, forseti í FC Barcelona, staðfestir sambært Team Talk, at Manchester City fegin vil hava Samuel Eto'o í hópin til komandi kappingarárið. – Vit hava fingið eitt óhoyrt tilboð frá City, soleiðis, at Eto'o verður heimsins best lønti fótbóltsleikarin í heiminum. Hann vil fegin verða verandi, men tað er trupult at vísa einum tílíkum tilboði aftur, sigur Laporta, sambært Team Talk.



## Jacklin skiftir til Neistan

Jacklin Durhuus spælur í komandi kappingarári við Neistanum. Tað skrivar heimasíðan hjá felagnum. Hon royndist sera væl hjá Kyndli í fjør, hóast liðið flutti niður í næstbestu deildina. Jacklin Durhuus, sum áður hevur spælt við VÍF, er serliga eyðkend fyri sín stríðsvilja og gjøgnumbrotsstyrki.

# Størstu leikir

**Enn einaferð seta Oyggjaleikirnir met. 2.700 ítróttarfólk kappast hesa vikuna um at vinna sær gull á leikunum**


jakup@sosialurin.fo
Jákup Mørk

Størstu og longstu Oyggjaleikirnir í søguni vórðu settir á Wiklöf Holding Arena í Mariehamn á Álandi leygardagin.

Hetta eru trettandu leikirnir, sum verða hildnir, og fyri fyrstu ferð yvir høvur spenna hesir nú um heila viku.

Áður hevur annars verið vanligt, at setanin hevur verið sunnukvøld, tó at einstakar kappingar so smátt eru byrjaðar longu undan hesum. Og fríggjakvøld hevur verið vanligt at hava endahátíðina.

Stóra talið av luttakarum til ymsu kappingarnar hevur tó gjørt, at leikirnir hesa ferð vórðu settir leygardag, soleiðis at sunnudagurin allur sum hann var kundi brúkast sum kappingardagur. Og hesa ferð verða seinastu finalurnar leygardagin, soleiðis at talan samanlagt er um sjey heilar dagar, har kappast verður í teimum 14 ítróttargreinunum, sum eru á skránni.

### Drúgvur dagur

Hóast setanin í longd ongan tíð kom í nær námind tí, sum føroysku íðkararnir upplivdu á Rhodos fyri tveimum árum síðani, so var ikki frítt, at talið av føroyskum íðkarum fækkaðist, so hvørt sum minuttirnir gingu á setanini.

Partvíst hevði talan verið um ein sera drúgvan ferðadag, har fyrsta flogfarið fór úr Vágum klokkan 5.30, og partvíst skuldu fleiri av føroysku ítróttarfólkunum í kapping dagin eftir.

Hitin í bakandi sólini, sum ger um seg í Mariehamn hesar dagarnar, var hartil í yvirkantinum av tí, sum verður tilrátt ítróttarfólkum, sum bara eitt samdøgur seinni skulu út í harða kapping, og samanlagt fekk hetta fleiri venjarar at mæla sínum fólkum til at fara heim á hotellið, heldur enn at treiskast í sólini.

### Føroysku beraranir

Ein partur av hátíðarhaldinum kring setanina er sjálvandi eisini tey bæði, sum verða vald at bera ávíkavist Merkið og føroyska vatnið.

Merkið er sjálvsagdur partur av setanini, tá hetta jú er løtan, har liðini vísa seg fram fyri bæði mótstøðufólkum og áskoðarum. Og hesa ferð var tað badminton-spælarin, Aksel H. Poulsen, sum bar merkið.

Vatnseremoni'in er somuleiðis fastur partur av oyggjaleikasetanini. Vatnið er tað elementið, sum allar oyggjarnar eiga í felag, og tí er fastur siður, at luttakandi oyggjarnar hvør í sínum lagi hava vatn við heimanífrá.

Hetta verður latið í eitt gosvatn, soleiðis at samleikin hjá øllum oyggjunum kann sjóvast saman, meðan leikirnir eru, og á endahátíðini fylla luttakararnir sínar krukkur aftur. Hesa ferð við vatni, sum er ein samrenning frá øllum oyggjunum.

Hjá føroyska liðnum var tað hesa ferð fimleikarin, Durita Sigmarsdóttir Davidsen, sum bar vatnílætið.

Myndir: Álvur Haraldsen




Rannvá Eiriksdóttir, sum býr á Álandi, skuldi ætlandi vera partur av føroyska skjótiliðnum, men hesum mátti hon sleppa, tá undirtøkan á kvinnusíðuni var ov lítil




Løgmaður, Kaj Leo Johannesen, er verji hjá ítróttinum, og hann gekk á odda fyri føroyska liðnum á innmarchinum



Durita Sigmarsdóttir Davidsen letur føroyska vatnið í listarverkið, sum nú er flutt inn til sonevnda Game Street í Mariehamn



The Friendly Games verða Oyggjaleikir eisini róptir, og longu við setanina var sjónligt, at vinarbond verða knýtt